# Summarið merkist hjá BR-Leikum



## Ein hugsar kanska ikki so nógv um tað, men eisini hjá BR-Leikum merkist tað, at summarið er í nánd

**BR-Leikur** er óivað millum størstu handlar av sínum slag í Føroyum. Og leikur av alskyns slag eru at fáa, og so skuldi ein hildið, at hetta var tað.

Men sum so ofta, so er tað ikki altíð bara lætt og ómakaleyst, tá ein fæst við tað, ið hevur við børn at gera.

Vit onnur hugsa neyvan stórvegis um tað, men hjá BR-Leikum merkist tað eisini, at summarið er í nánd, og hesum laga tey seg sjálvsagt eftir.

- Tað merkist, at summar er í luftini, siga tey hjá BR-Leikum.

Nú er tíðin, har børn spæla úti, og t.d. súkklur, spakar og spannir og rulluskoytur eru millum tað, ið børn ysnkja sær, ella fáa í gávu.

### Ikki bert summarvørur

BR-Leikur er stórur leikuhandil, og úrvalið er stórt. Og sjálvsagt eru tað ikki bert vørur, ið eru nýtiligar úti summarhálvuna, ið fara um diskin hesa ársins tíð.

Eittnú verður nógv selt av tí vældámda Nintendo DS spælinum, ið er  lætt at hava við sær, og hetta er óivað óført at stytta sær stundir við hjá børnunum á baksetrinum í bilinum, um familjan skal ferðast í summar, og langir biltúrar eru á skránni.

### Dáma væl ekort

BR-leikur er við í ekort skipanini, og teimum dámar væl skipanina, og sama kann sigast um kundarnar, ið dáma væl tey 5,5%, ið tey fáa í vinningi.

Og í BR-Leikum gera tey við skelti við kassan vart við, at ekortið kann nýtast, og vart verður eisini gjørt við teir fyrimunir, ið eru við hesum.

Í BR vóna tey, at fleiri fáa eyguni upp fyri fyrimununum við ekortinum, tí teir kundar, ið hava ekort, eru glaðir fyri skipanina.

---

# Optikbúðin í vøkstri




## Í Optikbúðini í Havn hevur framgongd verið seinastu árini, og tveir optikarar starvast nú í fyritøkuni, ið nú eisini telur tveir handlar. Í Optikbúðini eru tey væl nøgd við ekort skipanina og nógv ekort eru farin ígjøgnum

Optikbúðin hevur verið 21 ár í Bøgøtu í Havn, og er sostatt ein sonevnd havnarmynd. Men tó ikki ein mynd, ið ikki broytist.

Fyritøkan er nógv vaksin og telur nú tveir handlar, báðir í Bøgøtu, og tveir optikarar starvast nú í fyritøkuni.

Sjey starvsfólk eru knýtt at Optikbúðini.

### Stórt úrval

Í optiktikbúðini hava  tey allar optiskar vørur, so sum brillur, sólbrillur, linsur og kikarar.

Optikbúðin hevur sera stórt úrval, og dentur verður lagdur á at hava merkivørur, og at góðskan er í hásæti.

### Nýggj tøkni

Virksemið er nógv vaksið seinnu árini, og fyritøkan hevur eisini fylgt við. Øll útgerðin til at kanna eygu við er nýggj, og tað er nýggjasta tøkni, ið verður nýtt.

### Nógv at gera

Í Optikbúðini hava tey úr at gera, og hvønn dag verða nógvar sjónkanningar gjørdar.

Eisini lata tey í Optikbúðini væl at skipanini við ekortum, og har eru nógv ekort farin ígjøgnum, verður sagt, og sjálvsagt fegnast tey um, at ljós nú verður varpað á fyrimunirnar við ekortinum, so enn fleiri fáa lut í teim fyrimunum, ið kortið hevur.